# Timburarbeiðið útboðið



*Arkitekturin og borgarstjórin hyggja at grundini, sum dagstovnurin í Sørvági nú skal byggjast omaná*
*Mynd - Erik Davidsen*

**Klárt er nú at bjóða timbur- og snikkaraarbeiðið við nýggja dagstovnin í Sørvági út. Tilboðini skulu verða inni um ein mána**

ÚTBJÓÐING
*Edvard Joensen*

**Sørvági:** Biðið verður nú um tilboð upp á timbur- og snikkaraarbeiðið í samband við nýggja dagstovnin í Sørvági.

Jørð- og betong arbeiðið er gjørt í vetur. Alt arbeiðið við útgrevstri og kloakkering varð gjørt av Kristiani Olsen í Sørvági.

Síðan er stoypiarbeiðið og asfaltering av økinum eisini gjørt. Tað var Gutti Guttesen í Bø, sum stóð fyri tí arbeiðinum, sigur borgarstjórin í Sørvági, Jákup Suni Lauritsen.

Borgarstjórin sigur, at nýggi dagstovnurin er ætlaður at hýsa gott 80 børnum í fyrsta umfari, men at møguleiki er fyri at víðka hann til at kunna taka í móti 100 børnum.

Í nýggja dagstovninum verða bæði vøggustovu- og barnagarðspláss, eins og ætlanin eisini er, at frítíðarskúlin skal húsast undir sama taki.

Í Sørvági er í dag, umframt vøggustovuna og barnagarðin í Sýsluni, sum eru gomlu sýslumanshúsini í Sørvági, eisini ein dagrøktarskipan, sum verður niðurløgd, tá nýggi stovnurin verður tikin í brúk, sigur Jákup Suni Lauritsen, borgarstjóri.

# Nýggj útstykking í Sørvági

**Sørvágs Kommuna er í ferð við at gera klárt til fleiri nýggj sethús í bygdini**

ÚTSTYKKING

Eftirspurningurin eftir grundstykkjum er vaksandi í Sørvági, og kommunan fer nú undir eina nýggja útstykking.

Uppi við Mýravegin við síðuna av nýggja dagstovninum verður nú gjørt klárt til eina útstykking við einum 15 - 20 grundstykkjum, sigur Jákup Suni Lauritsen, borgarstjóri í Sørvági.

Hann sigur, at arbeiðið upp á at gera tey fyrstu 10 grundstykkini byggibúgvin fer í gongd nú beinanveg.

**ej**

# Umvæling fyri milliónir

**Skipið hjá ríkisumboðnum, Thorshavn, fær eina størri umvæling á Tórshavnar Skipasmiðju. Hjá ríkisumboðnum vænta tey, at umvælingin fer at kosta góðar fýra milliónir krónur**

UMVÆLING
*Edvard Joensen*



*Thorshavn fær eina størri umvæling, sum væntandi fer at kosta meira enn fýra milliónir*
*Mynd: Jens Kristian Vang*

Thorshavn verður rættiliga uppstásað í hesum døgum. Ein umvæling, sum væntandi fer at kosta oman fyri fýra milliónur krónur er í gongd og skal ætlandi verða liðug í juni.

Thorshavn er gamalt træskip, sum er smíðað í 1941. Hóast skipið hevur havt hampiligar umstøður sum so, er altíð okkurt at taka hondina í. Slíkt sum plankar, elkervið og okkurt annað, ið skal gerast, sigur Dan Knudsen, fulltrúi hjá ríkisumboðnum.

Tað er ikki soleiðis, at klassi ella sýn hava kravt hesar umvælingarnar, sum nú verða gjørdar, sigur hann. Hetta er vanligt viðlíkahald, sum eigarin heldur vera fyri neyðini.

Í hesum førinum snýr tað seg um timburarbeiði, onkrar nýggjar elinnleggingar og onkrar broytingar innanborða, sigur hann. Onkur hurð verður flutt niðriundir, og okkurt tílíkt, sum mett verður praktiskt. Einki verður tó gjørt við maskinuna, sum er ein B&W Alpha frá 1949. Ein av hesum góðu, gomlu tungvektarunum, sum bara gongur, tá sett verður í gongd.

Tað hevur verið róð framundir, at hetta verður gjørt beint nú, tí kongalig vitjan verður í summar, og skipið skal brúkast í tí sambandinum.

Men tað er ikki beinleiðis orsøkin til umvælingina, sigur Dan Knudsen. Hetta skuldi gerast kortini.

Tað verða alt færri og færri skipstimburmenn í Føroyum. Teir eru fleiri í eitt nú Danmark og Skotlandi. Men kortini hevur ríkisumboðið valt at umvæla skipið í Føroyum. Higar koma so ráðgevarar av og á at hyggja at arbeiðinum og vegleiða, sigur Dan Knudsen, fulltrúi hjá ríkisumboðnum, sum er reiðarí hjá Thorshavn, sum forsætismálaráðið í Keypmannahavn eigur.

# Skipsmenninir sakna Útvarpið

**Millumbylgjusendarin hevur verið sløktur síðan sunnumorgunin, og teir, sum fiska undir Føroyum, hoyra ikki Útvarpið. Tað er saknur í tí, siga teir**

TØGN
*Edvard Joensen*



*Týsdagin lá millumbylgjusendarin hjá Útvarpinum tigandi á triðja samdøgurði*

Í skrivandi stund, sum er fyrrapart týsdag, hevur millumbylgjusendarin hjá Útvarpinum verið tigandi á triðja samdøgurði. Tað ger, at skipini undir Føroyum ikki hoyra Útvarpið, og tað sakna teir, sum eru umborð.

Sosialurin tosaði fyrrapartin týsdagin við eitt skip, sum lá og dró línu suður úr Mykinesi. Haðani varð sagt, at tað var bara onkra hendinga ferð, tá onkur fjørður var opin, at eitt FM signal rakk teimum. Og tað er veruligur saknur í hesum ikki at hoyra Útvarpið, siga teir.

Tað er Føroya Tele, sum umsitir sendararnar. Í hesum førinum millumbylgjusendaran, sum stendur í Akrabyrgi.

Jens Julian Reinert, sum starvast hjá Føroya Tele, sigur, at teir hava ikki funnið fram til, hvat tað er, sum bagir sendaranum. Leitað hevur verið eftir brekinum síðan sunnudagin, men fyrrapartin týsdagin var framvegis einki brek funnið.

Sendarin varð sløktur leygarkvøldið sum vant, tá sendingarnar hjá Útvarpinum vóru lidnar. Men tá tendrast skuldi sunnumorgunin, fór hann ikki í gongd.

Tá Sosialurin tosaði við Jens Julian Reinert týsdagin, visti hann als einki um, nær nakað ljóð kundi væntast úr aftur millumbylgjusendaranum.

# Jørgin stórliga fagnaður í Reykjavík

Frjálslyndi flokkurin í Íslandi hevði landsfund um vikuskiftið. Á skránni var fiskivinnupolitikkur, sum er eitt av høvuðsmálum floksins. 150 fólk vóru møtt til fundin, sum varð hildin í Reykjavík.

Jørgen Niclasen var gestarøðari og greiddi frá føroysku fiskidagaskipanini. Fagnaðurin var so stórur, at Jørgen Niclasen fleiri ferð varð avbrotin á fundinum av lógvabrestum.

Frjálslyndi flokkurin hevur sum mál at fáa skift íslendsku kvotaskipanina út við eina skipan, sum hevur føroysku fiskidagaskipanina sum fyrimynd.

Um hetta evnið sigur Jørgen Niclasen:

– Tað er ein stór og spennandi avbjóðing at greiða frá okkara skipan, serliga nú tað gongur niður. Tað er sera umráðandi fyri okkum, at fiskidagaskipanin verður viðurkend so víðað sum møguligt.

– Vit eiga tí at leggja størri dent á at kunna umheimin um okkara fiskidagaskipan, sigur hann.

Eisini konservativi flokkurin í Bretlandi ynskir broytingar í ES-fiskivinnupolitikkinum. Eisini hesin flokkur hevur føroysku fiskidagaskipanina til fyrimynd í síni valskrá til bretska parlamentsvalið, sum verður í mai mánaði.

**sb.**